DAGSINS MEINING

Neyðugt við nýggjari kós

Tað er neyðugt, at føroyska samfelagið broytir politisku kósina her og nú. Í seks ár hevur fullveldismálið fullkomiliga dominerað føroyskan politikk. Í seks ár er nógv orka og sera nógvur peningur brúktur uppá fullveldismálið, ið kortini ikki er komið úr stað. Veljarakanningar vísa, at samgongan, ið hevur havt valdið seinastu seks árini, hevur ikki undirtøku í fólkinum fyri sínum fullveldispolitikki. Heldur ikki í sjálvari samgonguni hevur verið semja um hetta mál heldur enn um nakað annað mál. Fullveldismálið hevur tí at kalla lamt føroyskan politikk hesi seks árini. Samgonguflokkarnir hava sitið hendur í favn, meðan samfelagið við vaksandi ferð rekur móti búskaparkreppuni. Atgerðarloysi, klandur og stríð hava eyðkent ta landsstýrissamgongu, sum nú er á veg í søguna.

Nú er tíðin komin at farast má víðari, at seta nýggja kós út í politiska kortið. Nú kunnu hini stóru málini ikki bíða longur. Vit hugsa um pensionsmálið, familjupolitikkin, umhvørvispolitikk, almannamál, fiskivinnupolitikkin og um búskaparpolitikkin sum heild. Tað er nú uppá tíðina, at politikkur aftur fer at snúgva seg um hesi mál – um dagligt lív og um fólksins gerandisdag. Lata vit framvegis bara standa til, kemur hetta atgerðarloysi at elva til stórar trupulleikar í framtíðini.

Sjálvstýrismálið er eitt stórt mál, ið má og skal loysast sum skjótast. Hugskotið hjá Javnaðarflokkinum er tað, sum liggur næst tí, sum ein meiriluti av føroyingum tykist vera samdur um. Tað er tí best fyri land og fólk, um Føroyar fáa eina samgongu, ið megnar at loysa sjálvstýrismálið eftir Javnaðarfloksins leisti. Tá tjóðskaparliga semjan er fingin í lag, kunnu øll tey stóru málini, ið enn liggja á láni, loysast. Ein nýggj og arbeiðsfør samgonga má alt fyri eitt fara undir at loysa teir búskaparligu trupulleikarnar. Fleiri stórar vinnur eru í álvarsomum trupulleikum, og arbeiðsloysið veksur stútt innan hesar vinnur og innan tær vinnugreinar, ið eru tengdar at kreppuraktu vinnunum. Her má gerast nakað heilt álvarsamt og tað í stundini!

Tað er stórur tørvur á streymskifti í føroyskum politikki – á eini nýggjari politiskari kós fyri okkara land. Tað er tørvur á nýggjum politikki. Hesin politikkur skal loysa sjálvstýrisspurningin á ein virðiligan hátt og sømiligan. Her er tjóðskaparliga semja Javnaðarflokksins besta boð. Tað er tørvur á einum politikki, ið megnar at loysa eitt hitt størsta almannamálið, nevniliga pensiónsmálið. Barnafamiljurnar eru hart kroystar, og tí má vend koma í. Vit skulu hava systkinaavslátt, sunnan ókeypis skúlamat og mjólkaprísurin má lækka. Íbúðarmálið er framvegis sum ein marra fyri tær ungu familjurnar og einsamallar møður eru púra sleptar uppa á fjall. Heimarøkt og heilsuverk eru í djúpari kreppu, umhvørvismál og skúlamál liggja á láni. Tað er tørvur á einum nýggjum, virknum og visonerum vinnulívspolitikki, ið m.a. skal tryggja útbúgving av verkafólki og tryggja, at landsins ognir ikki verða latnar privatum fyri lítið og lætt.

Tað er alneyðugt við nýggjum politikki, um ikki vælferðarsamfelagið skal fara fyri bakka. Tað er tørvur á einum landsstýri, ið tekur fulla ábyrgd av okkara samfelag og av øllum samfelagsbólkum. Valstríðið hevur víst, at tann flokkur, sum hevur besta boð uppa ein nýggjan politikk á nærum øllum økjum, er Javnaðarflokkurin. Tað er tí í tøkum tíma, at hesin flokkur aftur kemur upp í landsins politisku leiðslu.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ófrættakend gongd

Schandorff Vang

Allir politiskir flokkar rópa hart upp um, at teir eru so sera demokratiskir, men hvar fór hetta góða demokrati í valstríðnum?

Hví – finnast tílíkir vandalar, sum ikki kunnu lata tær stríðandi krefturnar standa sína roynd, og lata boðskapin hjá teimum ymsu flokkunum fáa frið at standa uppi?

Hví – kunnu ódemokratisku vandalarnir ikki skilja, at flokkarnir brúka nógva orku, tíð og pening til at fáa sín boðskap fram – pening sum skapar virksemi?

Hví – hava hesir vandalar ikki virðing fyri øðrum meiningum enn teirra egnu?

Er tað veruliga hesar vandalistisku – ella fascistisku – kreftir vit skulu hava framat at stýra landi okkara?

Eg fái meg ikki at trúgva, at boðini koma frá floksins leiðslum, men vísir tað seg serliga, at tað er Sambandsflokkurin, sum fær sín boðskap skræddan ella brotnan niður. Hetta byrjaði longu til seinasta fólkatingsval, og tá vóru tjóðveldisboðskapir settir upp á sama stað ístaðin.

Longu tá hoyrdist um skipaðan tjóðveldisungdóm, sum savnaðist á ávísum støðum fyri síðan at koyra runt og bróta niður sambandsboðskapin.

Hetta endurtók seg til seinasta løgtingsval.

Hetta endurtekur seg enn grovari í 2004. Hesuferð leggja teir ikki bert eftir uppsettum skeltum, men eisini við at bróta rútar í bilum, sum hava sambandsboðskapin standandi í rútinum.

Hesir ódemokratiski ótangarnir fremja rætt og slætt herverk. Tí heiti eg á tykkum, sum síggja slíkt fara fram, um at leggja í geyma, hvørji hesi fólk eru og siga politinum frá, so tey kunnu fáa sína revsing.

Sambandsfølisir uppundir val

(Floksleyst valagg)

Meinhard Jensen

Ein dagin var prominentasta sambandsfólk í landinum - Lisbeth - í Útvarpi Føroya. Hon segði seg føla, at Danmark og Føroyar og Grønland eru jevnbúrdis partar í sama ríki. Onkur vildi protestera, men tað legði Lisbeth onki í, tí hon føldi sum hon føldi.

Danskarar kunnu krevja, at vit tosa danskt í Føroyum, men vit kunnu ikki siga, at tey tosa føroyskt í Danmark.

Danskarar bestemma, at vit skulu flagga við donskum flaggi, men vit bestemma ikki, hvørjum danskarar flagga við.

Danskar fyritøkur fáa føroyingar at keypa vørur gjøgnum Danmark, men føroyingar fáa sjáldan danskarar at keypa útlendskar vørur gjøgnum okkum.

Danskarar kunnu bestemma, hvørjir útlendingar sleppa til Føroyar at búgva og ferðast, men føroyingar sleppa ikki at bestemma, hvørjir útlendingar sleppa til Danmarkar.

Føroyingar sleppa bara til Olúmpiadu undir Dannebrog, men danskarar høvast ikki føroyskt flagg.

Danskarar kunnu seta okkum undir administratión, tá vit hava krisu, men vit kunnu ikki seta tey undir administratión.

Danskarar kunnu annullera fólkaviljan í Føroyum, men vit kunnu ikki annullera danskar fólkaatkvøður.

Føroyar eru stýrdar eftir eini heimastýrislóg, sum er ein donsk lóg, men Danmark er ikki stýrt eftir føroyskari lóg.

Danmark er heldur ikki føroysk koloni og so framvegis.

So totalt obliviøst bara at føla út í tóman heim soleiðis, at man er jevnbúrdis við danir. Heldur man. Men har sum klárskygni ikki sleppur framat, skulu aðrar kreftir til. Sum ein sum ein dagin helt seg føla, at vit eru ein tjóð. Hvat ST danska stjórnin og grundlógin halda, tað var alt onki í mun til hansara følisir. Ein annar – ein tingmaður við følilsum – føldi, at hann átti Danmark minst líka væl sum Danmark átti hann.

Snýr tað seg bara um, hvat man føler í sær sjálvum, haldi eg, at tað er gott at koma í kontakt við sítt innara eg og kanska tí uttaru virkuligheitina eisini.

Ávaring

Elsa Blicher

Nú tað stundar til valið, vil eg geva føroya fólki eina ávaring.
Einki val hevur verið so álvarsamt sum júst hetta. Fyrr galt tað bara um vit skuldu hoyra undir Danmark ella ikki.
Eg havi altíð valt samband, men tann dag Danmark fór inn í ES, tá kúvendi eg, tí eg var klár yvir, at nú fóru teir ikki at gevast, fyrr enn teir høvdu fingið okkum inn í ES eisini.
Tann, ið lesur Bíbliuna, sær, at Antikrist kemur frá ES. Tað stendur fleiri staðni í Bíbliuni um Antikrist. Lesið til dømis Dánjal kap. 7.
Hann, ið tískil velur menn, sum vilja inn í ES, hann er við til at fara í kríggj móti teimum heilagu og móti Ísrael, Guðs fólk.
Øll, ið lesa Bíbliuna, vita, at Antikrist kemur frá Satan. Eg velji fyrr alt annað, enn at selja mína sál til Satan.
Varið tykkum eisini fyri teimum, sum misbrúka Guðs navn. Tað er bert fjórða hvørt ár, at teir minnast til, at Guð er til. Hansara navn er alt ov dýrabart at brúka til valagn.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Páll á Reynatúgvu

Sandoyarfólk!
Verjið tjóðskaparvarðan!
Valevni Tjóðveldisfloksins í Sandoy
Tjóðveldisflokkurin
www.tjodveldisflokkurin.fo

Frithleif Olsen

Tryggleiki · Framburður · Vælferð
Besta trygd fyri framburði í Føroyum er
Sambandsflokkurin
www.samband.fo

Jaspur Vang
Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Standið saman um Suðuroynna!
Sambandsflokkurin
www.samband.fo

Andrea Eldevig

E - kunnu tryggja framtíðina
Valevni Tjóðveldisfloksins í Eysturoy
Tjóðveldisflokkurin
www.tjodveldisflokkurin.fo

Jenis av Rana

Valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy
Miðflokkurin
www.midflokkurin.fo

Charlotta á Váli Olsen

Míni hjartamál eru:
· Barnafamiljur
· Brekað
· Gomul og sjúk
· Trivnaðin í øllum samfelagnum
Valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy
Miðflokkurin
www.midflokkurin.fo





Jacob Vestergaard

Valevni Fólkafloksins í Suðuroy
Fólkaflokkurin
www.folkaflokkurin.fo